# Hósdagur 22. november

**SVF**

18.25 DV í kvøld
18.30 Smásøgur
18.35 Jumanji 31
19.00 Tað fyrsta ári av lívinum – norsk sending
20.00 Dagur og Vika við Kjak
20.50 Rangt og rætt 5:8
21.30 Horvin 8:8 – donsk dokumentarrøð
22.00 Ally McBeal 13 – amerikonsk røð
22.45 Krimitímin: Dalziel og Pascoe 2:2
23.35 Liðugt

**Eurosport.com**

07:30 Golf
08:30 Sailing
09:00 Truck Sports
09:30 Car Racing
10:00 Football
10:30 Football
11:00 Golf
12:00 Football
13:30 Ski Jumping
16:00 Bobsleigh (Live)
17:00 Alpine Skiing (Live)
18:00 Bobsleigh (Live)
19:00 Football
19:30 Alpine Skiing
20:00 Alpine Skiing (Live)
21:00 Football
21:30 Rally
22:00 News
22:15 Football
00:15 News
00:30 Close

**BBC Prime**

0.00 TLZ: »Prohibition – 13 Years that Changed – The Road to Repeal«
1.00 TLZ: »Century of Flight – Strike From the Air«
2.00 TLZ: »Playing Safe«
2.30 TLZ: »The Museum of Modern Art«
2.55 TLZ: »Heroes and Monsters«
3.00 TLZ: »Cinema for the Ears«
3.25 TLZ: »Cyberart«
3.30 TLZ: »A Thread of Quicksilver«
4.00 TLZ: »Troubleshooter – In the Nutcrackers«
4.40 TLZ: »Zig Zag – France – Paris - A City«
5.00 TLZ: »Greek Language & People – Getting Around«
5.30 Muzzy In Gondoland
6.00 Bodger and Badger
6.15 Playdays: »The Whybird Stop«
6.35 Steps to the Stars
7.00 Ready Steady Cook
7.30 Garden Magic: »Telford«
8.00 House Invaders: »Rugby«
8.30 Bargain Hunt: »Newark«
9.00 Battersea Dogs Home
9.30 Vets in Practice: »Langford Revisited«
10.00 Radical Highs
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr. Who: »Vengeance on Varos«
11.30 Doctors
12.00 Eastenders
12.30 Hetty Wainthropp Investigates: »Woman of the Year«
13.30 Radical Highs
13.45 Ready Steady Cook
14.15 Bodger and Badger
14.30 Playdays: »The Whybird Stop«
14.50 Steps to the Stars
15.15 TOTP Eurochart
15.45 Ainsley's Gourmet Express: »Fusion«
16.15 Ground Force: »Edinburgh«
16.45 Miss Marple: »Murder at the Vicarage«
17.45 The Weakest Link
18.30 Doctors
19.00 Eastenders
19.30 Murder Most Horrid: »Mrs Hat and Mrs Red«
20.00 Dalziel and Pascoe: »Under World«
21.00 A Bit of Fry and Laurie
21.30 A History of Britain: »Burning Convictions«
22.30 Living with the Enemy: »London Church of Christ«
23.00 Maisie Raine: »Getting to be a Habit«

**BBC World**

0:00 BBC News
0:30 HARDtalk (r)
1:00 BBC News
1:30 World News Tonight
2:00 BBC News
2:30 Talking Movies (r)
3:00 BBC News
3:30 Asia Today (r)
3:45 World Business Report (r)
4:00 BBC News
4:30 HARDtalk
5:00 BBC News
5:30 World Business Report
6:00 BBC News
6:30 World Business Report
7:00 BBC News
7:30 World Business Report
7:45 Sport Today
8:00 BBC News
8:30 HARDtalk (r)
9:00 BBC News
9:30 Talking Movies (r)
10:00 BBC News
10:30 USA Direct (r)
11:00 BBC News
11:30 HARDtalk (r)
12:00 BBC News
12:30 World Business Report
12:45 Sport Today
13:00 BBC News
14:00 BBC News
14:30 USA Direct (r)
15:00 BBC News
15:30 Asia Today
16:00 BBC News
16:30 HARDtalk (r)
17:00 BBC News
17:30 World Business Report
17:45 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 USA Direct (r)
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Click Online
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

**TV 3**

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:10 TV-shop
08:00 Panter-tanter(G)
08:25 Ricki Lake (G)
09:15 Ricki Lake
10:10 Horton-sagaen(G)
11:00 Horton-sagaen
11:50 Panter-tanter
12:20 Vild med dig
12:50 Pæn pige - sej sild
13:20 Baywatch Hawaii(G)
14:15 Charlie`s Angels
15:10 Min kære familie
15:40 Baywatch Hawaii
16:35 Ricki Lake
17:30 Med på moden
18:00 Sabrina - skolens heks
18:30 Alle tiders barnepige
19:00 Robinson - Talkshow
20:00 Flere øjne i natten
22:05 Tve-kampen(G)
23:10 Vore værste år
23:40 Simpsons
00:10 Ricki Lake(G)
01:05 Drøm videre
01:35 Vore værste år (G)
02:00 Simpsons(G)
02:25 Sunset Beach
03:10 Godnat

**ÚF**

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur - Bergur Jacobsen, prestur, lesur
07.15 Barnaløtan - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
07.30 Tíðindi
07.35 Morgunrásin
08.00 Tíðindi
08.03 Morgunrásin - Hilmar Jan Hansen og Bjarni Mohr leggja til rættis.
09.00 Tíðindi
09.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
09.35 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) - Bergur Jacobsen, prestur, lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 1
10.10 Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm skipar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) - Gunnvør Poulsen leggur til rættis
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Fimmarin (e)
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt - Tróndur Vatnhamar velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Bitar úr Billboard - Rúni Jákupsson stílar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum - Símun Jóannesarson Hansen stílar fyri
18.00 Barnaløtan (e) - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Skiftissiðir á lívsleiðini : Polterabend - Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Crescendo - Kári Olsen stílar fyri
20.30 Framhaldssøga
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Øssur Egholm leggur til rættis

## Skiftissiðir á lívsleiðini: Polterabend

ÚF Hóskvøldið kl. 19.00

Polterabend er gamal siður í útlondum, men ikki í Føroyum. Seinastu árini hevur hann eisini verið tikin upp her hjá okkum.

Nakrar dagar fyri brúdleypið fara vinfólk eftir komandi brúður ella brúðgómi og fáa tey so at gera ymiskt, sum fer út um alt og øll mørk.

Gestir í sendingini eru Dia Midjord og Birgir Sondum.

*Armgarð Arge leggur til rættis.*

## Rangt og rætt 5:8




Orsakað av Fólkatingsvalinum er Rangt og Rætt hesaferð flutt til hóskvøld. Men hóast onkur politikkari er í sendingini, so hoyra vit ikki eitt orð um politikk. Í sendingini verður kappast um at velja og vraka millum margháttligar orðafrágreiðingar og at royna sín kunnleika innan tónleik. Og so skulu luttakararnir á liðunum hjá Kára Mouritsen og Jógvani E. Ósá eisini royna at nema seg fram til navnið á dulda lutinum. Tað eru Hansen og Hansen og Hansen, sum leiða okkum ígjøgnum sendingarnar. Leivur er vertur, meðan Jens Marni og Kim manna húsorkestrið.

*Sendingin verður endursend leygardagin kl. 16.00.*

## Flere øjne i natten

*- amerikanskur filmur frá 1993*




Richard Dreyfuss og Emilio Estevez halda áfram har teir sluppu í fyrra filminum.

Teir báðir politmenninir Bill og Chris verða sendir á eina nýggja uppgáva, har teir skulu avgera, um eitt sera týdningarmikið vitni goymir seg hjá O'Hara hjúnunum. Vitni Lu Delano er í stórum vanda, eftir at hann hevur játtað at vitna ímóti einum mafiabossi. Uppgávan verður meira torgreidd, tá ið nakrar merkiligar hendingar koma fyri. Chris hevur eisini trupulleikar við gentu sínari, Mariu, sum vil hava meira burturúr teirra forholdið.

22.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
23.00 Tíðindi

**Rás 2**

09:45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
11:00 Tónleikur
12:00 Tíðindi og kunngerðir
12:15 Tónleikur
13:00 Ynskiløtan - Heilsanir frá lurtarum - Sunneva Petersen er vertur - Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan (framhald)
15:00 Tíðindi og kunngerðir
15:15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
16:00 Tónleikur
17:00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík - John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18:00 Tíðindi og kunngerðir
18:15 Tónleikur
19:00 Orð á leiðini (EvR) - Endatíðin: "Jesus ræður" - Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi og kunngerðir
21:15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Tónleikur
22:00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. - Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
00:00 Liðugt

13.00 Byrjan — Dagsskráin verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Hansen (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Horizon Star v/ Stellu Zachariassen (e)
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Lýsingar fyri møtir ið verða í vikuskiftinum.
20.55 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti (e)
21.00 Bønarlinjan við gesti, vertur er Jenis av Rana - Bønarevni kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379
Vit gevast uml. middnátt



## FÓLKATINGSVALIÐ 2001

# Meiningsleyst at senda tjóðveldismann ella sambandsmann á fólkating

**Andreas Petersen**
*valevni fyri javnaðarflokkin*



Líkamikið hvør vinnur fólkatingsvalið í Danmark, so er tað umráðandi at javnaðarlfokkurin fær umboðan á fólkatingi, har hann kann bera fram síni sjónarmið viðvíkjandi føroyska samfelagnum útfrá eini sosialdemokratiskari samhaldsfastari hugsjón.

Seinastu 4 árini hava verið merkt av politiskum stríði ímillum Føroyar og Danmark viðvíkjandi støðu okkara í ríkisfelagsskapinum. Sitandi samgonga legði sterkt út við nógvum ógvusligum ætlanum um sjálvstýri, hóast vit ikki høvdu fíggjarligan ella fakligan førleika fyri hesum. Tá alt skuldi standa sína roynd við fólka-atkvøðu um hendan spurning 26. mai í ár, tordi samgongan ikki, tí hon visti sjálvandi at undirtøka ikki var hjá føroya fólki at fara burturúr ríkisfelagsskapinum.

Samstundis hava veljarakanningar víst, at ein meiriluti av føroya fólki ynskir broytingar í viðurskiftinum ímillum Føroyar og Danmark. Hetta ynski um broytingar samsvarar væl við uppskot javnaðarflokksins um eina sjálvstýrislóg innanfyri ríkisfelagsskapin, har møguleiki verður at yvirtaka nærum øll samfelagsmál eftir fíggjarligum og fakligum førleika og í sama viðfangi syrgja fyri at lívskorini hjá vanliga føroyinginum eru á sama støði sum í londunum rundanum okkum. Hetta er ein treyt fyri at unga fólkið ikki støðast í hesum landi og fær hug at seta búgv og virka her, so er meiningsleyst at tosa um sjálvstýri.

Tann ekstrema og radikala leiðin er orynd og hevur spælt fallit í hesum valskeiði. Tí gevur tað onga meining at senda ein tjóðveldismann á fólkating at ópa um tað sama. Tað gevur heldur onga meining at senda ein sambandsmann á fólkating at bera fram sjónarmið um, at einki skal henda ella at tað bert skulu gerast kosmetiskar broytingar í viðurskiftunum ímillum Føroyar og Danmark.

Tað er staðfestur ein politiskur ivlji í Føroyum til broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum innanfyri ríkisfelagsskapin. Samstundis er staðfestur ein breiður politiskur meiriluti í danska Fólkatinginum til nøkurlunda somu broytingar innanfyri ríkisfelagsskapin. Tí vildi tað verið politiskt skilagott at framt henda møguleika í komandi valskeiði.

Hetta gerst best við at velja javnaðarflokkin á fólkatingsvalinum nú 20. november og sterkan á komandi løgtingsvali soleiðis at miðjan í tjóðskaparpolitikkinum verður loysnin í framtíðini eins og hon var tað tá heimastýrislógin varð gjørd í 1948.

Gott val!

# Eitt samfelag fyri øll

**Elisabeth Joensen (Betta)**
*valevni Sambandsfloksins*



Í grein 7 í stevnuskrá Sambandsfloksins stendur, at flokkurin vil arbeiða fyri, at sosiala lóggávan verður soleiðis skipað, at tey gomlu, tey sjúku, tey brekaðu og onnur, sum hava hjálp fyri neyðini fáa stuðul og viðgerð, ið ikki stendur aftanfyri tað, sum fæst í hinum Norðanlondum.

Eitt øki, sum hevur verið nógv umrøtt hesi seinastu árini, er pensjónsøkið. Til tess at veita okkara pensjonistum ein bata, legði Sambandsflokkurin í august mánað uppskot fyri løgtingið hesum viðvíkjandi. 400 mió. krónur í ár, og aftur 400 mió. krónur næsta ár skuldu leggjast í ein grunn, og avkastið av hesi upphædd skuldi síðani gjaldast øllum pensjónistum afturat grundupphæddini í fólkapensjónini. Skotið varð upp, at fyrsta útgjaldið skuldi verða 1. januar komandi ár.

Sambandsflokkurin vildi á henda hátt tryggja pensjonistum eitt hægri gjald. Av tí at bert avkastið av hesum peningi skuldi gjaldast út, meðan stovnsfæið bleiv liggjandi, hevði hetta ikki økt skattatrýstið hjá fólki.

**Tey eldru gerast fleiri í tali**

Sambært hagtølum eru stívliga 6.000 pensjonistar í Føroyum nú, men roknað verður við, at talið fer upp um 9.000 áðrenn 20 ár eru liðin. Tí metir Sambandsflokkurin tað vera alneyðugt at gera nakað munagott nú, tí tað er ikki vist, at peningur verður tøkur, um vit útseta málið til seinni.

Sum kunnugt varð uppskotið felt av samgonguni.

Um so var, at uppskot Sambandsfloksins varð samtykt, hevði hetta økt um útgjaldið til pensjónistar við umleið 1.000 krónum um mánaðin. Hetta vísir, hvussu nógvur peningur skal til fyri at nøkta tørvin á pensjónsøkinum.

Vit, í Sambandsflokkinum, eru av tí áskoðan, at tað er av størsta týdningi, at stórur partur av landskassavlopinum verður nýtt til at tryggja okkara eldru ein virðiligan aldurdóm. Tað eru tey, sum hava bygt upp hetta samfelagið, sum vit nú nýta gott av.

Nú kann onkur siga, at hetta við pensjónum hevur einki við eitt fólkatingsvalið at gera. Tað er møguligt, men tað hevur nógv at gera við okkara støðu til ríkisfelagsskapin, tí fullveldispolitikkurin kostar hópin av peningi, sum annars kundi verið nýttur skilagott m.a. til frama fyri tey eldru í samfelagnum.

Veljarin kann stuðla okkara politikki við at atkvøða fyri Sambandsflokkinum 20. november.

# Sjálvstýri men ikki loysing

**Hans Jørgensen**
*Valevni Javnaðarfloksins til Fólkatingsvalið*



Latið ongan iva ráða um støðu Javnaðarfloksins, vit vilja gera tað, sum stendur í okkara valdi at gera eina virðiliga skipan millum tveir javnsettar partar í ríkinum. Hetta er aðaltátturin í Sjálvstýrilóg Javnaðarfloksins.

Javnaðarflokkurin byggir alt sítt virksemi á fult fólkaræði. Vit leita altíð eftir semjum til tess at vinna fólki okkara bestu kor.

Vit ivast onga løtu í, at bert føroyingar sjálvir duga at taka avgerð um, hvat er best fyri Føroya fólk, og tí eru tað føroyingar einsamallir og eingir aðrir, ið skulu avgera framtíðina hjá føroyingum.

Allur politikkur Javnaðarfloksins er bygdur á hetta. Eisini strembanin eftir politiskum sjálvræði og búskaparligum sjálvbjargni, ið er fortreytin fyri veruligum sjálvstýri í Føroyum.

Álvaratos, vil landsstýrið fullveldi, so takið fullveldi. Haldið ikki fram at grenja inn á Nyrup og hansara menn í Keypmannahavn. Trupulleikin er í Føroyum. Tað er ikki meiriluti fyri loysing, tað er trupulleikin hjá landstýrinum. Um meiriluti var fyri loysing so fingu teir loysing.

**Fulla virðing veruligum loysingarfólki**

Eg havi fulla virðing fyri føroyskum loysingarfólki, teimum, sum veruliga vilja taka loysing og samstundis taka við teim avleiðingum og skyldum, tað hevur við sær, men eg havi lítla virðing fyri teimum nýggju tjóðveldisfólkunum, sum billa føroyingum inn, at tað ber til at loysa nú og fáa danir at gjalda fyri loysingina. Hetta er at kasta mold í eyguni á fólki.

Hetta er at venda byttuni á høvdið, tí vóru hesir tjóðveldismenn eins og teir gomlu, so høvdu teir sagt, at í morgin loysa vit og liva av tí ríkidømi, skaparin gav okkum føroyingum. Søgdu teir hetta, so kendu vit Tjóðveldið gamla aftur. Men teir nýggju vilja, sum ein tjóðveldismaður plagdi at siga: lumpa og lirka, so fólk uttan at kenna avleiðingarnar taka undir við teimum. Ja, tað er so galið, at summir teirra kalla okkum, sum ikki eru samdir í fullveldisætlan landsstýrisins fyri landasvíkjarar og danskar lakajar.

Loyva vit okkum at greiða frá, at alt verður ikki, sum tað var. At lívsfrælsið fær álvarsligt afturstig, so kalla teir tað ræðumyndir og ræðsluherferðir.

Sakligheitin og opinleikin, sum skuldi eyðkenna fullveldisprosessina gjørdist so innilokað og spent, at tað sambært talsmonnum samgongunar mest er at kalla halgibrot. Og Gud náði tann, sum váðar sær at finnast at fullveldisætlanini.

Men tað gera vit kortini. Vit vísa á eina góða og gagnliga skipan millum javnsett lond í ríkisfelagsskapi, og tað gerst við Sjálvstýrislóg Javnaðarfloksins.